## Italia hótti Bosnia

Allir hondbóltsáhugaðir føroyingar vóna, at tað føroyska hondbóltslandsliðið fer at taka síni fyrstu stig í heimadystinum í EM-undankappingini ímóti Italia leygardagin. Eingin ivi skal kortini vera um, at talan verður um eina ríkiliga stóra avbjóðing, tá fyrstu stigini skulu fáast til høldar. Italia spældi í kvøld á útivølli ímóti Bosnia Herzogovina, og tapti italiumenn tepurt 31-28 til Bosnia Herzogovina. Støðan í hálvleikinum var 19-16 til heimaliðið, og megnaðu italiumenn at fylgja heimaliðnum næstan allan vegin. Tá Føroyar spældu í Bosnia gjørdist talan um eitt stórtap uppá 45-28, aftaná hálvleiksstøðuna 21-12 til Bosnia.



## Finnur var skaddur

Ein skaði í fótliðnum hevur við sær, at Finnur Hansson ikki er partur av landsliðshópinum, sum í gjár royndi seg móti Russlandi og sum í morgin skal spæla móti Italia. - Eg gav avboð til landsliðið, tí nú satsi eg alt til tess at kunnu spæla 100% í vetur. Seinasta vetur spældi eg mest sum við hálvari megi, tí eg hevði beklað annan fótin so illa, sigur Finnur Hansson við heimasíðuna hjá Neistanum.

Føroyar-Russland 18-34 (10-14):

# Munur á grindadrápi

**Tað eydnaðist ikki hondbóltslandsliðnum at gera U21-liðnum hjá fótbólti kynstrið eftir. Russiska bjørnin var kanska í dvala eina løtu, men tá hon vaknaði, var ikki lukkuligt hjá okkara at standa fyri**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tað sá eina løtu út til, at hondbóltsmenninir hjá okkum eisini ætlaðu at gera sítt til, at russiski bjarnastovnurin skuldi oyðast.

Hóast ein hondbóltsdystur er drúgvur at koma ígjøgnum, so áttu okkara tey bæði fyrstu málini, og fyri steðgin vóru sjáldan nøkur serlig tekin um, at tað veruliga skuldi skrædna millum liðini.

Dia Midjord hevði undan dystinum boðað frá, at føroyingar skuldu fáa ferð í sítt spæl, um vit skuldu hava nakran møguleika fyri einum hampuligum úrsliti, og hetta helt eisini teir fyrstu 30 minuttirnar á tamb.

Fremsta orsøkin til hetta var, at føroyska liðið als ikki framdi mongu teknisku mistøkini, sum annars hava kostað so nógv í flestu av undankappingardystunum. Hóast liðið mátti vera spælarar sum Áka Mørk, Inga Olsen og Heina Hanusarson fyriuttan, so nervaði hetta ikki spælið stórvegis.

Í verjupartinum riggaði eisini væl at koma út at tackla væl vaksnu russisku miðspælararnar, og tá Levi Nybo so eisini hevði einar 6-7 klassabjargingar, sá máltalvan so heilt hampuliga snøgg út, tá farið var inn til hálvleiks.

Og tað var eisini sjónligt, at russar ikki vóru serliga nøgdir við støðuna. Í øllum førum líktist tað eini frustraraðari roynd, tá ein av spælarunum við einum



*Tað var ein hampuligur tyngdarmunur á liðunum báðum. Her er Gunnar Bláberg í hornatøkum við vælvaksna strikuspælaran hjá Russlandi*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

alboga langaði Bárð Johannesen í gólvið. Úrslitið var beinleiðis reytt til russiska spælaran, og Bárður kundi eftir ein lítlan steðg halda áfram við sínum stinna verjuspæli.

### Bjørnin vaknaði

Ivaleyst hevði russiska liðið fingið ein uppsang frá venjara sínum í steðginum. Uttan nakra samanbering annars, so vóru boðini um russisku fiasko'ina í Gundadali týskvøldið ivaleyst eisini komin hondbóltsspælarunum fyri oyra, og teir settu seg væl og virðiliga á mest sum alt